# Ferðamannaskip á Vestmanna

Tað er ikki so øgiliga vanligt, at ferðamannaskip liggja í Vestmanna. Men í dag liggur ferðamannaskipið Clipper Adventurer við bryggju í Vestmanna. Talan er um eitt lutfalsliga lítið ferðamannaskip, har 85 ferðafólk eru við og eini 77 eru á manningarlistanum. Skipið hevur ligið í Havn, men í dag liggur tað á Vestmanna og fer at liggja har til í nátt. Meðan skipið liggur í Vestmanna eru ferðafólkini farin ein túr undir Vestmannabjørgini við bátum í Vestmanna. Sambært havnarmeistaranum, Leivur Olsen, er skipið komið úr Skotlandi og fer helst víðari til Íslands. Ferðafólkini eru mest bretar, men eisini Avstralia, Belgia og Kanada, eiga borgarar umborð. Clipper Adventurer er fyrsta ferðamannaskipið í Vestmanna í ár. Onki var í fjør, meðan tvey vitjaðu í fyrrárið.



# Álvarssamur trupulleiki kann loysast

Ein danskur lívfrøðilesandi hevur funnið eitt protein, sum kann forða fyri, at ísur legst á veingirnar á flogførum. Proteinið hevur danski granskarin funnið í larvum, sum halda til í deyðum stubbum av træslagnum Rhagium mordax. Granskarin, Casper Wilkens, sigur við danska kringvarpið, at sambært kanningunum ber tað til at blanda proteinið upp í máling, og kanningar vísa, at proteinið tolir kulda niður í 30 stig. Tað kann vera sera vandamikið, um ísur legst á veingirnar á einum flogfari, og í ringasta føri kann tað gera, at flogfarið dettur niður.

# Fyrsta føroyska vodkafløskan

**Eldvatn er heitið á nýggja brennivíninum, sum Dism framleiðir. Fyri fyrstu ferð er føroyskt vatn roynt í handilsligari brennivínsframleiðslu**

BRENNIVÍN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eitt nýtt slag av føroyskum brennivíni stendur á hillunum, tá handlarnir hjá Rúsdrekkasølu Landsins lata upp í morgun. Nýggja brennivínið hevur fingið heitið Eldvatn og er næsta produktið hjá Dism.

Eldvatn er trífalt dropadrivið vodka framleitt úr føroyskum vatni.

- Talan er um vodka í heimsflokki. Framleitt úr føroyskum vatni, siga menninir handan Dism, Mortan Mols Mortensen og Erling Eidesgaard.

Eldvatn Vodka er framleitt úr føroyskum kelduvatni, og hetta er fyrstu ferð, at tað er roynt í handilsligari brennivínsframleiðslu.

- Í reinum vodka spælir vatnið ein sera týðandi leiklut. Og har mugu vit siga, at tað føroyska vatnið hevur spælt sín leiklut væl. Føroyska vatnið er gitið fyri at smakka væl og vera leskiligt, og hetta smakkar tú eisini ígjøgnum í Eldvatni, siga teir í Dismi.




*Dism hevði slept eini gongu av seyði niðan í rúsuna í morgun at lýsa fyri Eldvatni*

### Framleitt uttanlands

Brennivínsframleiðsla er, sum kunnugt, ikki loyvd í Føroyum. Tískil verður Eldvatn framleitt í útlegd. Vatnið verður tappað í tangar úr víðagitnu Fransakelduni í Tórshavnar Kommunu og siglt yvir hav til Íslands, har framleiðslan gongur fyri seg.

- Eldvatn er trífalt dropadrivið og sílað við state of the art útgerð. Úrslitið er eitt ektað premium vodka. Hóast hetta og hóast nøgdirnar eru smáar, er prísurin kappingarførur, siga menninir handan Dism.

Navnið Eldvatn er eitt elligamalt føroyskt orð fyri brennivín, ið verður lítið brúkt í dag. - Vit hildu tað vera stuttligt at geva hesum bombastiska orði ein nýggjan kjans. Navnið gerst heldur ikki verri av, at tað er í familju við slóðaran, Lívsins Vatn, sigur brennivínshúsið.

### Etikettin

Á etikettini sæst ein drekaseyður. Eitt mytologiskt seyðaskepilsi við longum hala og ógvusligum hornum, sum spýtir eld. Drekaseyðurin goymir at Eldvatninum, ið liggur fjalt í føroysku fjøllunum. Virðisløntí teknarin og barnabókahøvundurin Bárður Oskarsson hevur teknað drekaseyðin.

- Okkara mál er at framleiða autentiskt føroyskt brennivín, hóast lógin forðar okkum at gera tað heima á klettunum. Her hava vit eitt vodka, ið smakkar, sum um tað var gjørt her heima – av føroyskum vatni, heilt einfalt av Føroyum, sigur Erling Eidesgaard.

# Renna Nólsoynna úr enda í annan

**Komandi leygarkvøld verður gjørligt at renna úr Nólsoyar bygd út á Borðina og heim aftur. Kunningarstovan skipar saman við royndum rennarum fyri serstaka tiltakinum**

RENNING
*Leif Láadal*
*leif@sosialurin.fo*

Fyri nøkrum árum síðani byrjaðu tveir mans í Nólsoy at renna regluliga úr bygdini út á Borðina og heim aftur. Við íblástri frá hesum túrum, skipar kunningarstovan í Nólsoy nú fyri einum heilt serligum almennum túri fyri fólki, sum hava orku til at renna ávísa longd.

- Hetta er ein heilt serlig uppliving, sum ikki einans gevur rennarum tað, sum sjálv renningin gevur. At renna í sólsetri í haganum við tí náttúruljóði, sum er á staðnum, er nakað heilt serligt, sigur Ámundur Nolsø, ið er ein av teimum, sum skal syrgja fyri, at allir rennarar koma út á Borðina og upp á pláss aftur.

Fyri at luttaka í renningini leygarkvøldið 20.juni, er tó neyðugt at vera hampiliga væl fyri kropsliga. Ámundur Nolsø sigur, at rennararnir mugu klára at renna 10 kilometrar út í eitt uttan stórvegis hóvasták.

Fólk við áhuga fyri túrinum, sum verður seint leygarkvøldið, kunnu seta seg í samband við Kunningarstovuna í Nólsoy.

*Nólsoyingar fara saman við øðrum at renna Nólsoynna á tamp leygardagin*

